# Umsókn um barsilspening: Løntakari

**Høvuðstreytirnar fyri at fáa rætt til barsilspening eru, at tú:**

1. ert kvinna, sum fer frá arbeiði, orsakað av viðgongu ella barnsburði
2. ert faðir at nýføddum barni, og fer frá arbeiði fyri at vera heima hjá barninum
3. ert foreldur, sum fer frá arbeiði fyri at vera heima hjá ættleiddum barni
4. hevur fastan bústað í Føroyum
5. hevur fulla skattskyldu í Føroyum
6. at tú ert um barnið í farloyvistíðarskeiðinum

**Skjøl, sum skulu latast inn saman við umsóknarblaðnum:**

1. læknaváttan um nær mett verður, at barnið verður føtt, tá søkt verður um barsilspening í upp til 4 vikur áðrenn barnsburð ella
2. læknaváttan um, at tað fyri fostur og/ella mammu stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, tá søkt verður um barsilspening í upp til 8 vikur áðrenn barnsburð ella
3. fráboðan um barnsburð/ættleiðingarloyvi, tá søkt verður um barsilspening fyri tíðarskeiðið eftir barnsburð

Inntøka vunnin í Føroyum seinastu 12 mánaðirnar áðrenn barsilsfarloyvi, skal ikki skjalprógvast. Barsilsskipanin fær hesar upplýsingar til vega beinleiðis frá TAKS.

**Sjálvstøðug vinnurekandi, ið hava teknað trygging, skulu umframt lata inn:**

1. sjálvuppgávu, skattaroknskap og skattauppgerð fyri síðst lokna roknskaparár, áðrenn fráveru frá arbeiði vegna barsilsfarloyvi.

**Løntakarar við útlendskum arbeiðsgevara, ið hava teknað trygging, skulu umframt lata inn:**

1. lønarseðlar frá arbeiðsgevaranum fyri løn, sum er útgoldin seinastu 12 mánaðirnar áðrenn barsilsfarloyvi

Barsilspeningurin kann ongantíð verða meiri enn 25.000 kr. um mánaðin.

Umsóknarblaðið skal fyllast út nágreiniliga. Vanta upplýsingar ella neyðug skjalprógv, loyvir Barsilsskipanin eini 14 daga freist, frá tí at tú ert kunnað/ur um hetta, til at útvega neyðugu skjølini.

Sbrt. § 14 í Løgtingslóg um barsilsskipan skal umsókn um barsilspening **latast inn innan 6 mánaðir** eftir barnsburð ella, í sambandi við ættleiðing, eftir at tey hava fingið barnið. Er umsóknin ikki latin inn innan hesa freist, fellur rætturin til barsilspening burtur.

Um tú gevur skeivar ella misvísandi upplýsingar, verða upphæddir kravdar afturgoldnar, og tú kanst verða revsað/ur við sekt ella hefti. Upplýsingarnar, latnar á umsóknarblaðnum, kunnu í sambandi við eftirlit kannast við heimild í § 21 í Ll. um barsilsskipan frá 3. apríl 2001 við seinni broytingum.

Um móðir og faðir at barni bæði søkja um barsilspening, skulu tey útfylla hvør sítt umsóknarblað.

Um tú hevur nakrar spurningar, ert tú vælkomin at venda tær til Barsilsskipanina.

**Vinarliga fyll umsóknarblaðið út við spjaldrastavum.**

## 1. Umsøkjari

| | |
|---|---|
| Navn: | P-tal: |
| Gøta og nr.: | Telefon: |
| Postnr. og bygd/býur: | Fartelefon: |
| T-postur: | |
| Ert tú einsamøll/einsamallur við barninum?<br>*(sí vegleiðingina pkt. 1)* | JA ☐ NEI ☐ |

Skal sendast til: TAKS, postrúm 2151, FO-110 Tórshavn, faks á 35 26 01 ella við teldupost til taks@taks.fo

## 2. Tíðarskeið *(um móðir at barninum søkir um barsilspening, skal sjúkramelding/vandrejournal íroknast)*

| Frá *(dg. mð. ár)* | Til og við *(dg. mð. ár)* |
|---|---|
| | |
| | |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 30 vikur eftir føðing ☐ *(Um pápin tekur 4 vikur)* | 32 vikur eftir føðing ☐ *(Um pápin letur 2 vikur)* | 34 vikur eftir føðing ☐ *(Einlig/ættleiðing)* | 38 vikur eftir móttøku* ☐ *(Um pápin letur 4 vikur)* |

***** *Bert í samb. við ættleiðing*

## 3. Váttan frá pápanum (verður bert útfylt, **um** faðir at barninum letur ávíst tíðarskeið til mammu)

Eg vátti, at eg lati mammuni allar ella ein part av vikunum av farloyvinum, ið eru avsettar til mín sum pápa.

____________________ ________________________________

Dagfesting Undirskrift

## 4. Lønarskipan

Hevur tú sambært lóg og sáttmála rætt til løn frá arbeiðsgevara í tíðarskeiðinum, ið er upplýst í teigi 2?

JA ☐ NEI ☐

Um ja: *(niðanfyristandandi spurningar skulu bert útfyllast, **um** tú hevur svarað JA omanfyri)*

Full A-inntøka um mánaðin *(uttan eftirløn, frítíðarløn ella frítíðarískoyti):* ____________________ Rindi 1/2 løn ☐

Tíðarskeið *(frá - til og við):* ____________________

| | | | |
|---|---|---|---|
| 30 vikur eftir føðing ☐ *(Um pápin tekur 4 vikur)* | 32 vikur eftir føðing ☐ *(Um pápin letur 2 vikur)* | 34 vikur eftir føðing ☐ *(Einlig/ættleiðing)* | 38 vikur eftir móttøku ☐ *(Um pápin letur 4 vikur)** |

*(Um tú fært løn frá arbeiðsgevaranum, og arbeiðsgevaranum ynskir at fáa barsilspening útgoldnan, skal hann senda Barsilsskipanini eina umsókn um barsilspening)*

** Bert í samb. við ættleiðing*

## 5. Fleiri arbeiðsgevarar

Hevur tú tilknýti til fleiri arbeiðsgevarar **í tíðarskeiðinum, søkt verður um barsilspening?**

JA ☐ NEI ☐

**Um ja**, hvørjar? ________________________________________

*(um ja, skalt tú útfylla eitt umsóknarblað fyri hvønn arbeiðsgevara. Um talan er um nevndararbeiði er ikki neyðugt við váttan frá arbeiðsgevara tygara, men bert frágreiðing um hettar í teigi 14.)*

## 6. Partvís í arbeiði *(heldur áfram at arbeiða í farloyvistíðarskeiðinum – sí §8 a og § 12 í lógini)*

Ert tú partvís í farloyvistíðarskeiðinum?

JA ☐ NEI ☐

**Um ja:**

Navn á arbeiðsgevara/arbeiðsplássi: ____________________ V-tal: __________

Tíðarskeið *(frá - til og við):* ____________________ % av fullari tíð: ________

Skal sendast til: TAKS, postrúm 2151, FO-110 Tórshavn, faks á 35 26 01 ella við teldupost til taks@taks.fo

## 7. Verið á arbeiðsmarknaðinum styttri enn eitt ár

Hevur tú verið á arbeiðsmarknaðinum styttri enn eitt ár **beint undan barsilsfarloyvinum**?
*(sí vegleiðingina)*

JA ☐ NEI ☐

**Um ja:**
Nær byrjaði tú at arbeiða? *(dg. mð. ár)* ____________________

Hevur tú rætt til barsilspening úr øðrum landi? JA ☐ NEI ☐

## 8. Frítíðarløn

Ert tú limur í nøkrum løntakarafelag (fakfelag)?

JA ☐ NEI ☐

**Um ja:**
Hvørjum felag? ______________________________________

Um tú ert limur í løntakarafelag verður frítíðarløn tygara flutt til avvarðandi felag. Um tygum hinvegin ikki ert limur í nøkrum felag, verður peningurin fluttur í Frítíðargrunnin.

## 9. Hvagar skal barsilspeningurin flytast?

Navn á peningastovni: ____________________________________

Kontonummar: ☐☐☐☐ – ☐☐☐☐☐☐☐

## 10. Bústaður og full skattskylda í Føroyum

Hevur tú fulla skattskyldu og fastan bústað í Føroyum í tíðarskeiðinum, søkt verður um barsilspening? JA ☐ NEI ☐

## 11. Hevur tú fingið útflýggjað? *(er eisini at finna á www.barsil.fo undir lóg)*

Løgtingslóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001 JA ☐ NEI ☐

Kunngerð um umsiting av Barsilsskipan frá 31. mai 2001 JA ☐ NEI ☐

## 12. Til arbeiðsgevaran at útfylla *(frágreiðing **skal** í teig 14 um hesin teigur ikki verður fyltur út)*

Navn á arbeiðsgevara: ____________________________________

V-tal: ____________________________________

Eg vátti, at upplýsingarnar í teigunum: 2. Tíðarskeið, 4. Lønarskipan, 6. Partvís í arbeiði og 7. verið á arbeiðsmarknaðinum styttri enn eitt ár, eru rættar.

________________ ________________________
Dagfesting Stempul og undirskrift

Skal sendast til: TAKS, postrúm 2151, FO-110 Tórshavn, faks á 35 26 01 ella við teldupost til taks@taks.fo

## 13. Váttan frá móðir at barninum (verður bert útfylt, **um** faðir at barninum søkir um barsilspening)

Eg vátti, at pápin at barninum er umsøkjarin.

Føðingardagur og P-tal

Navn

Dagfesting

Undirskrift

Um pápin søkir um barsilspening **í meira enn 4 vikur eftir 14. viku** eftir barnsburð, sigi eg frá mær rættin til barsilspening og vátti somuleiðis, at eg ikki eri frá arbeiði við løn í hesum tíðarskeiðinum.

Dagfesting

Undirskrift

## 14. Viðmerkingar

| |
|---|
| |
| |
| |
| |

## 15. Váttan og undirskrift umsøkjarans

Eg bindi meg til at geva Barsilsskipanini boð um allar broytingar í viðurskiftum mínum viðvíkjandi omanfyri nevndu spurningum og annars um viðurskifti, sum kunnu hava týdning fyri Barsilsskipanina, harundir barsilspeningin.

Eg vátti sambært § 8 a, at eg eri um barnið í barsilsfarloyvistíðarskeiðnum ímeðan eg fái barsilspening, og Vátti somuleiðis eg at hava lisið hjáløgdu vegleiðingar og at givnu upplýsingarnar eru sannar.

Dagfesting

Undirskrift

*(Víst verður til Løgtingslóg um barsilsskipan frá 3. apríl 2001 við seinni broytingum og Kunngerð um umsiting av Barsilsskipan frá 31. mai 2001)*

# Barsilsskipanin

## V e g l e i ð i n g

### 1. EINSAMØLL/EINSAMALLUR

Við einsamøll/einsamallur eftir §9, stk. 5 skal skiljast, at tú ert ógift/ur, skild/ur ella separerað/ur. Faktiskt samlívsslit kann vera javnsett við seperatión. Tú skal eisini vera einsamøll/einsamallur um umsorganina fyri barninum og lúka treytina um ikki at liva saman við hinum av foreldrunum at barninum, ella einum, sum tú hevur verið giftur við. Og tú kann ikki fáa stuðul, um tú hevur ein sambúgva.

### 2. TÍÐARSKEIÐ FYRI BARSILSFARLOYVI

Sbrt. § 9 í lógini hevur tú rætt til barsilspening, tá mett er, at 4 vikur eru eftir til barnsburð og upp til 34 vikur eftir barnsburð.

Um tú við læknaváttan prógvar, at tað fyri fostur og/ella teg sjálva stendst heilsuvandi av at vera í starvinum, hevur tú rætt til barsilspening í fyrsta lagi frá tí degi, at mett verður, at 8 vikur eru eftir til barnsburð.

Ert tú faðir at barninum, kanst tú søkja um barsilsfarloyvi í 16 vikur eftir 14. viku eftir barnsburð. Rætturin til barsilsfarloyvi kann bert verða nýttur av einum av foreldrunum í senn. 4 vikur eru serliga avsettar til pápan, ið hann kann velja at taka samstundis sum mamman ella eftir tær fyrstu 30 vikurnar.

Í tíðarskeiðinum skulu fyrsti og seinasti farloyvisdagarnir skrivast. Um tygum søkja til og við 30/38 vikur eftir barnsburð/ættleiðing, er nóg mikið at seta kross í viðkomandi teig.

**DØMI**

Sett at eiga 1. desember 2011. Søkir um barsilspening 4 vikur áðrenn barnsburð og 30 vikur eftir barnsburð.

| Frá | Til |
|---|---|
| 03.11.2011 | ______________ |
| ______________ | ______________ |

| 30 vikur ☒ | 32 vikur ☐ | 34 vikur ☐ |
|---|---|---|

### 3. VÁTTAN FRÁ PÁPANUM

Sambært § 9, stk. 6 kunnu foreldrini avtala, at mamman skal hava upp til 2 vikur av teimum 4 vikunum, sum serliga eru avsettar til pápan.

### 4. LØNARSKIPAN

Í nøkrum sáttmálum á arbeiðsmarknaðinum hava løntakarar rætt til løn frá arbeiðsgevaranum í farloyvistíðarskeiðinum. Í summum sáttmálum er talan um ein part av lønini í einum parti av tíðarskeiðinum. Fært tú sambært sáttmálanum fulla løn í farloyvistíðini, og arbeiðsgevarin ynskir at fáa barsilspening, skal arbeiðsgevarin senda Barsilsskipanini eina umsókn um at fáa barsilspening útgoldnan.

Barsilsskipanin rindar sbrt. § 15 í lógini ikki fyri eftirløn.

Í tíðarskeiðinum skal fyrsti og seinasti farloyvisdagur skrivast. Um tygum søkja til og við 30-34 vikur eftir barnsburð/ættleiðing er nóg mikið at seta kross í ávikavist kassa A,B ella D.

### 5. FLEIRI ARBEIÐSGEVARAR

Um so er, at tú hevur tilknýti til fleiri arbeiðsgevarar, skalt tú útfylla eitt umsóknarblað fyri hvønn arbeiðsgevara.

### 6. PARTVÍS Í ARBEIÐI

Hevur tú fleiri størv ella ynskir at røkja eitt starv niðursetta tíð t.d. ein part av tíðarskeiðinum, er hetta møguligt sbrt. § 12 í lógini.

Skal sendast til: TAKS, postrúm 2151, FO-110 Tórshavn, faks á 35 26 01 ella við teldupost til taks@taks.fo

Um tú t.d. arbeiðir vanligt 40 tímar um vikuna, og í barsilstíðarskeiðnum framhaldandi arbeiðir 10 tímar um vikuna, so skal her skrivast, at tú arbeiðir 25 % av fullari tíð. Inntøkugrundarlagið verður lækkað samsvarandi hesum.

Í tíðarskeiðinum skulu fyrsti og seinasti farloyvisdagur, ið ein partvíst arbeiðir, skrivast.

### 7. VERIÐ Á ARBEIÐSMARKNAÐINUM STYTTRI ENN 1 ÁR

Nýsettur í starv er tann, sum hevur verið á arbeiðsmarknaðinum í minni enn eitt ár, beint undan fráveruni vegna barnsburð, sbrt. § 12, stk. 2 í lógini.

Tú skal hava verið burtur frá arbeiðsmarknaðinum, áðrenn tú byrjaði í nýggjum starvi. Um tú hevur verið í ALS verður tú mett/ur at hava verið á arbeiðsmarknaðinum.

### 8. FRÍTÍÐARLØN

Um tú ert limur í løntakarafelag, verður frítíðarløn tín flutt til avvarðandi felag. Um tú hinvegin ikki ert limur í nøkrum felag, verður peningurin fluttur í Frítíðargrunnin.

### 9. HVAGAR SKAL BARSILSPENINGURIN FLYTAST?

Barsilspeningurin verður fluttur um afturhaldsskipanina á ta kontu, tú hevur upplýst her.

### 10. BÚSTAÐUR OG FULL SKATTSKYLDA Í FØROYUM

Fyri at hava rætt til barsilspening, skalt tú hava fastan bústað og fulla skattskyldu í Føroyum, í tíðarskeiðinum søkt verður um barsilspening.

### 11. HEVUR TÚ FINGIÐ ÚTFLÝGGJAÐ?

Um tú ikki hevur fingið lóg og kunngerð, verður hetta sent tær.
Tað er týdningarmikið, at tú heldur teg kunnuga/n við lóg og kunngerð, so tú kennir tíni rættindi og skyldur.

### 12. TIL ARBEIÐSGEVARAN AT ÚTFYLLA

Sbrt. kunngerð um umsiting av Barsilsskipan skal arbeiðsgevarin vátta at teigar 2, 4, 6 og 7 hjá løntakara eru rættir. Um ein er í ALS, er hettar arbeiðsgevari tygara.

### 13. VÁTTAN FRÁ MÓÐIR AT BARNINUM

Hetta skal útfyllast, um tað er faðir at barninum, sum søkir um barsilspening.

### 14. VIÐMERKINGAR

Eru nakrar viðmerkingar, skulu tær skrivast her.

### 15. VÁTTAN OG UNDIRSKRIFT UMSØKJARANS

Um tú gevur skeivar ella misvísandi upplýsingar, verða upphæddir kravdar afturgoldnar, og tú kanst verða revsað/ur við sekt ella hefti, sbrt. § 26 í lógini.

Um tú tekur upp nýtt lønandi arbeiði í farloyvistíðarskeiðinum, ávirkar tað barsilspeningin, og skalt tú tí boða Barsilsskipanini frá hesum, sbrt. § 16 í lógini.

Sambært § 21 í lógini og § 6 í kunngerð um umsiting av Barsilsskipan kann Barsilsskipanin útvega sær allar upplýsingar frá TAKS, Landsfólkayvirlitinum og Almannastovuni til nýtslu í sambandi við útrokning og eftirlit við útgjaldsupphæddum.

## Set teg í samband við Barsilsskipanina:

Mánadag – Fríggjadag: kl. 9:00 – 15:00

Telefon 35 26 00 ella við telduposti til taks@taks.fo